


*Ongar útskiftingar vórðu gjørdar í nevndini hjá FSF hesuferð, tí nevndarvalið bleiv útsett*

# Sannleikans tími útsettur í FSF

**Eftir drúgvt orðaskifti um formanssessin og uppstillingina varð samtykt við teprum meiriluta at útseta val av formanni og nevndarlimum**

FSF FORMAÐURIN
*Jákup Mørk*

Fótbóltsfeløgini fóru sum av torvheygum úr FSF húsinum leygardagin. Í hvussu so er tey, sum høvdu roknað við, at nevndin fór at verða mannað, og at nýggjur nevndarformaður fór at verða valdur á ársaðalfundinum. Punktið hesum viðvíkjandi varð útsett til leygardagin 20. mars. Tá verður aðalfundurin tikin uppaftur, og tað verður einki annað á skránni enn punktið, sum hevur við nevndarval at gera.

Fyri uppskotinum um at útseta valini atkvøddu tólv. Ímóti vóru níggju og ein atkvøða – ivaleyst tann hjá FSF – var blonk.

Um tað verða eitt ella fleiri evni til formanssessin, og um tað verða fimm ella færri ella fleiri evni til teir tríggjar sessirnar í nevndini, sum skulu mannast, ber ikki til at siga nakað um enn. Um eingin av teimum, sum vóru í uppskoti til fundin leygardagin, tekur seg aftur, so verða teir eisini í uppskoti til fundin 20. mars. Inntil hóskvøldið 11. mars á midnátt ber til at koma við nýggjum uppskotum.

Fram til aðalfundurin verður tikin uppaftur, er Dánial Andreasen konstitueraður formaður í FSF, og nevndarlimirnir, sum hava verið í nevndini, sita í sínum sessum. Sagt verður, at støðan líkist henni, tá ið løgtingsval hevur verið, eftir at løgmaður hevur lagt frá sær, og tað verður bíðað eftir nýggjum løgmanni og landsstýri. Tá ber til ikki til at taka stórvegis politiskar avgerðir. Tað ber tað heldur ikki til hjá nevndini í FSF, inntil formaðurin og tríggir nevndarlimir eru valdir leygardagin 20. mars.

### Kroystur frá

Tá ið aðalfundurin leygardagin kom til punkt fýra, og orðstýrarin, Jógvan Arge, hevði staðfest, at bara eitt uppskot til formann var, og at Frithleif Olsen tískil eftir øllum at døma varð valdur, bað VB formaðurin, John Hendrik Holm um orðið.

Hann fjaldi ikki yvir, at hann ikki var serliga væl nøgdur við støðuna, sum nú var íkomin. Hann vísti á, at Dánial Andreasen ikki var í uppskoti, tí formaðurin seinastu tvey árini hevði kent seg kroystan at leggja frá sær. Hann visti eisini at siga, at Rúni Heinesen hevði tikið seg aftur sum formansevni, tí at hesin hevði fatan av, at hann ikki fór at fáa undirtøku.

VB formaðurin gav týðuliga til kennar, at hann als ikki var nøgdur við telvingina, sum hevði havt við sær, at Frithleif Olsen at enda varð einasta valevni, sjálvt um hann undirstrikaði, at hann einki persónligt hevði ímóti einasta formansvalevninum.

John Hendrik Holm setti uppskot fram um, at málið um val av formanni og nevndarlimum varð útsett.

### Vil breiða undirtøku

Spurningurin varð viðgjørdur eina góða løtu. Fyri teir, sum høvdu skotið Frithleif Olsen upp, vísti Eli Hentze, formaður í B71 á, at alt hevði gingið fyri seg innanfyri tað, sum er ásett viðvíkjandi vali av formanni og nevndarlimum. Hann mælti til, at fundurin valdi Frithleif Olsen til formann, og at atkvøtt varð millum teir fimm, sum vóru í uppskoti til teir tríggjar nevndarsessirnar.

Christian Andreasen, sum hevur verið nevndarlimur, men sum ikki hevur ynskt at vera í uppskoti at halda fram í nevndini, duldi ikki, at hann metti tað vera týdningarmikið, at nevndin nú beinanvegin varð arbeiðsfør, tí tað liggja nógvar uppgávur og bíða eftir nevndini.

Fleiri aðrir tóku orðið, men talan varð ikki um at viðgera fráfarandi formannin og áralagið í nevndini og samstarvið millum nevndina og umsitingina.

Áðrenn tað varð atkvøtt, bað Frithleif Olsen um orðið. Hann umboðaði ikki nakað felag, men orðstýrarin játtaði honum, sum tað eisini var rímuligt í hesi støðuni, orðið. Frithleif Olsen segði seg væl skilja, um tað varð meiriluti fyri at útseta formansvalið og valið av nevndarlimum. Hann segði seg vilja vera formann fyri øll feløgini í FSF, og at hann ikki hevði mett tað heppið, um bara helmingurin av feløgunum høvdu tikið undir við honum.

Tá ið orðstýrarin setti uppskotið frá VB formanninum til atkvøðugreiðslu, varð staðfest, at tað fór at verða samtykt, um meirilutin av fundinum tók undir við tí. Tólv atkvøddu fyri, og harvið var málið, sum undan fundinum hevði verið mest viðgjørt, útsett.

Um tað verður Frithleif Olsen ella onkur annar, sum verður FSF formaður, fæst ikki at vita fyrrenn 20. mars. Men tað er greitt, at Dánial Andreasen ikki verður í uppskoti:

– Mín tíð er farin. Eg havi boðað frá, at eg ikki ætli at halda fram sum FSF formaður, og ta avgerðina fari eg ikki at broyta, segði Dánial Andreasen.

# Lagt er upp til fyrsta valið

**Hóast tað higartil ikki er komið fyri, at fleiri enn eitt valevni hava verið til formanssessin í Fótbóltssambandi Føroya, so kundi aðalfundurin leygardagin bent á, at nú skulu fleiri valevni skjótast upp**

FSF FORMAÐURIN
*Jákup Mørk*

Tað er ongantíð komið fyri áður. Men á aðalfundinum hjá FSF leygardagin var tað okkurt, sum bendi á, at nú eru tað fótbóltsfeløg, sum vilja hava eina broyting í.

– Vit vilja hava nakað at velja í.

Tað segði Atli Gregersen, sum umboðaði SÍF, og sum segði seg sita við somu kenslu, sum formaðurin í VB hevði givið til kennar.

Tá ið tað verður sagt, at feløgini vilja hava nakað at velja í, so kann tað ikki skiljast øðrvísi, enn at tað skulu vera fleiri enn eitt valevni til formanssessin. Um tað verður soleiðis, tá ið fundurin verður tikin uppaftur leygardagin 20. mars, so verður støðan øðrvísi, enn hon hevur verið á øllum aðalfundunum, sum hava verið, síðani FSF varð stovnað í 1979.

Á fyrsta aðalfundinum varð Christian Olsen valdur til formann. Eingin stillaði upp ímóti honum. Í 1981 varð Tórleif Sigurðsson valdur til formann. Eingin stillaði upp ímóti honum.

Tá ið Tórleif fyri eitt sindur meiri enn tveimum árum síðani hevði boðað frá, at hann ikki fór at taka við afturvali, eftir at hann hevði verið valdur uttan mótvalevni í 20 ár, vóru fleiri møguligir formanskandidatar nevndir. Men tá ið freistin at skjóta formansvalevni var farin, var bara eitt uppskot til formann. Tað var Dánial Andreasen, sum aðalfundurin fyri tveimum árum síðani valdi uttan atkvøðugreiðslu.

Hesa ferð var eitt valevni, men hann varð ikki valdur. Fundurin varð útsettur. Um talan var um misálit á Frithleif Olsen, sum var tann einasti í uppskoti, ella um talan var um misálit á teir, sum høvdu skotið Frithleif Olsen upp og teir, sum stuðlaðu, at valið skuldi vera leygardagin, ber illa til at siga nakað um.

Frithleif Olsen boðaði sjálvur frá, at hann hevði einki ímóti, at fundurin varð útsettur. Hann tóktist ikki vera serliga fegin um, at hann møguliga fór at verða valdur til formann bara við undirtøku frá einum parti av feløgunum.

Eftir fundin skiltist tað á fleiri fundarluttakarum, at teir tóku undir við uppskotinum um at útseta formansvalið og nevndarvalið, tí teir vónaðu, at tað tær næstu vikurnar fer at bera til at mýkja støðuna, soleiðis at Fótbóltssamband Føroya og harvið føroyski fótbóltsheimurin ikki skal ganga í tveimum nærum eins stórum bólkum.



# Meistararnir runda av í Runavík

**Silvurvinnararnir ætlast í síðsta umfarinum at fáa vitjan av bronsuvinnarunum, og hundrað ára gamla KÍ skal í síðsta umfarinum spæla á heimavølli ímóti ÍF**

LANDSKAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Tað kann vera, at onkur hevði roknað við, at HB og KÍ, sum í hesum árinum bæði fara um tey hundrað, í átjanda og síðsta umfarinum skuldu bresta saman. Úrslitini hjá øllum tíggju feløgunum á vøllinum frá fyrsta umfarinum, sum verður á skránni flaggdagin og til átjanda umfarið, sum verður á skránni 2. oktober, høvdu gjørt av, um tey bæði mest vinnandi feløgini skuldu spælt um FM heitið.

Men tað verður eingin finala millum HB og KÍ. Í hvussu so er ikki sambært tí uppskotinum til landskapping, sum FSF á aðalfundinum leygardagin legði fyri fótbóltsfeløgini.

Sambært hesum uppskotinum verður spælt soleiðis í átjanda umfarinum, sum er á skránnni 2. oktober: B36–B68, EB/Streymur–Skála, KÍ–ÍF, GÍ–VB og NSÍ–VB.

Tá ið kappingin verður so gomul sum ájtan umfør, kann tað fara at vísa seg, at allir dystirnir fara at verða áhugaverdir. Í fjør vann B36 silvur, og B68 vann bronsu. Í fjør megnaði Skála í síðsta umfarinum við heimasigri ímóti EB/Streymi at lyfta sær av aftasta plássinum. Tá ið KÍ í 1999 fyri higartil síðstu ferð ognaði sær FM heitið, vunnu teir í síðsta umfarinum á heimavølli og í áarføri ímóti ÍF. Tá ið HB vann FM í fyrraárið, var tað við sigri í Runavík, at teir tryggjaðu sær meistaraskapin, og dystirnir millum GÍ og VB eru altíð spennandi.

### Áhugaverd kapping

Enn ber sjálvandi ikki til at tosa um stórdystir, oddadystir og botndystir. Hvussu feløgini eru fyri, fara ábendingar at vera um, tá ið steypakappingin verður á skránni. Fyrstu venjingardystirnir hjá fleiri feløgum vóru nú um vikuskiftið. Leygardagin vann B68 2–0 í Runavík, og sunnudagin vann VB, sum í vikuskiftinum var á venjingarlegu á Svangaskarði, 4–2 á NSÍ í Runavík.

Fyrsta umfarið í landskappingini verður flaggdagin. Tá skulu júst NSÍ og VB spæla í Runavík. KÍ fær vitjan av B68, ið sum oftast hevur staðið seg væl í Klaksvík, ÍF skal í fyrstu royndini í bestu deildini í hesum umfarinum spæla í Gøtu, og B36 fer at fáa vitjan av EB/Streymi, sum árstalsfelagið í Havnini hevur fingið fleiri spælarar frá síðani síðsta kappingarár.

Níggjunda og síðsta umfarið undan summarsteðginum verður spælt 27. – 30. juni. 27. juni fara VB og GÍ at spæla á jóansøku í Vági, og tá fara ÍF og KÍ og Skála og EB/Streymur at spæla.



*Bárður Johannesen og HB enda komandi kappingarár við einum truplum útidysti í Runavík*

28. juni skulu B68 og B36 spæla, og 30. juni fær HB vitjan av NSÍ. Tann dysturin verður spældur seinni enn hinir, tí NSÍ skal spæla Intertoto Cup 26. juni.

Umstøðurnar hjá fótbóltsspælarunum at halda Ólavsøku verða ikki nakað serligar. Longu 1. august verður farið undir seinna partin av landskappingini. Tá fara mótstøðuliðini at vera tey somu, sum tey vóru í fyrsta umfarinum. Tey feløgini, sum í fyrsta umfarinum høvdu heimavøll, fara at hava útivøll, og tey, sum høvdu útivøll, fara at hava heimavøll.

### Rættulig finala

Í næstbestu deildini verður lagt upp til, at tað fer at verða spælt so at siga somu vikuskifti, sum tað fer at verða spælt í bestu deildini. Í 2. deild tykist tað verða lagt upp til rættuliga finalu. Í síðsta umfarinum, sum verður á skránni 2. oktober, skal TB spæla á heimavølli. Mótstøðuliðið verður FS Vágar. TB tapti í fjør endaspælið um uppflyting í bestu deildina ímóti Skála. FS Vágar flutti niður úr bestu deildini.

Umframt hesi bæði feløgini eru tað fýra onnur, sum kunnu flyta upp. AB spælir í síðsta umfarinum í Klaksvík, LÍF og Sumba skulu spæla í Leirvík, og B71 og Royn skulu bæði spæla á útivølli. B71 ímóti B36 og Royn ímóti VB.

Fyrsta umfarið í 2. deild verður spælt leygardagin 24. apríl. Tá er lagt upp til, at skráin skal síggja soleiðis út: B36–VB, TB–B71, LÍF–FS Vágar, Royn–AB og KÍ–Sumba.

Í skrivi til feløgini sigur FSF, at um feløgini hava nakrar viðmerkingar til leikdagarnar, so skulu hesar sendast FSF skrivliga, soleiðis at tær verða FSF í hendi í seinasta lagi 23. februar.

# Eysturoyggin leggur saman

**Silvurvinnararnir í B68 seta seg ikki førar fyri einsamallar at manna lið í bestu deildini**

KVINNUKAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Tað gongur skjótt upp og niður í kvinnufótbóltinum. Tað hava tað verið so nógv dømi um, og fyribils kappingarskipanin fyri komandi árið undirstrikar, at tað vendir skjótt hvønn vegin.

Í fjør vunnu B68 kvinnurnar fyri fyrstu ferð silvurkrónur í landskappingini. Í ár eru tær ikki nóg nógvar einsamallar at manna lið í bestu deildini. Avtala er gjørd millum B68 og GÍ um, at hesi bæði feløgini í felag skulu manna lið í bestu kvinnudeildini.



*Til tess at manna lið hevur verið neyðugt hjá B68 og GÍ at lagt síni kvinnulið saman*

Hvussu tað verður við venjing og dystum skilja vit á lagnum valdast eitt sindur um, hvussu áhugin og undirtøkan verður á Toftum og í Gøtu. Í fyrstu atløgu er ætlanin at venja aðru hvørja viku á Toftum og aðru hvørja viku í Gøtu og at skiftast um at spæla heimadystirnar á Svangaskarði og í Sarpigerði.

Gongdin hjá B68 og GÍ vísir, at kvinnufótbólturin í Eysturoy hevur so langt í frá somu støðu, sum mannfólkafótbólturin hevur tað. Umframt samansetta liðið av Toftum og úr Gøtu verður bara eitt lið úr Eysturoy í bestu deildini. Tað er EB/Streymur.

Samlaða talið av liðum í bestu kvinnudeildini verður átta. Umframt GÍ/B68 og EB/Streym verða hini liðini AB, B36, FS Vágar, HB, KÍ og Sumba.

Í fyrsta umfarinum, sum er sett at vera flaggdagin, verður spælt soleiðis: GÍ/B68–B36, FS Vágar –Sumba, AB–HB og KÍ–EB/Streymur. Síðsta umfarið er sett at vera 18. september. Tá verður spælt soleiðis: GÍ/B68–Sumba, FS Vágar–HB, AB–EB/Streymur og B36–KÍ.

Summarsteðgurin er ætlaður at vera frá 27. juni og inntil 15. august.